## Stórt hall í flúgvingini

Altjóða loftferðslufelagsskapurin IATA hevur ikki serliga góðar vónir um ta fíggjarligu gongdina hjá flogfeløgunum næsta ár. Í einari nýggjari meting roknar felagsskapurin við, at altjóða flogferðslan fer at hava einar 5,6 milliardir dollarar í halli í 2010. Tað er ein daprari meting enn tann, sum IATA kom við fyrr í ár, tí tá var metingin 3,8 milliardir dollarar. Kortini er metingin munandi betri enn úrslitið hjá altjóða flogferðsluni í ár, tí sambært teirri seinastu metingini er hallið hjá flogfeløgunum í ár umleið 11 milliardir dollarar. IATA væntar, at 4,5 prosent færri fólk fara at flúgva í 2010 enn í ár.




## Byggja risastóra brúgv

Í gjár varð farið undir arbeuðið at byggja eina risastóra brúgv, sum skal binda tað kinesiska meginlandið saman við Hong Kong og Macao. Sambært kinesisku fjølmiðlunum verður brúgvin knappar 50 kilometrar long og tann longsta av sínum slagi í heiminum. Búgvin, sum eftir byggiætlanini skal verða liðug í 2016, fer at stytta ferðatíðina millum Zhuhai á meginlandinum og Hong Kong úr hálvum fjórða tíma í 30 minuttir, samstundis sum ferðatíðin millum Hong Kong og Macao verður stytt úr trimum tímum í ein tíma, skrivar Xinhua.

# Blankar kúlur til jóla



**Hans Fróði Hansen ger aftur um seg. Nýggjasta røðin av vakurleikavørum frá Hans Fróða brýtur eitt tabuiserað mark, og fer undir beltið hjá manninum og kvinnuni. Barberingin verður ongantíð tann sama aftur, lovar hann**

VAKURLEIKARØKT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fyrrverandi landsliðsleikarin og núverandi trendsetarin, Hans Fróði Hansen, ger nú aftur um seg við vakurleikavørum.

Nakað av tíð er liðin, síðan vit seinast hoyrdu nakað til Hans Fróða, seinast tá tað kom fram, at hann fór undir at samstarva við amerikansku superstjørnuna Brandy um eina nýggja røð av smyrsl-vørum.

Nú er Hans Fróði aftur á marknaðinum við nýggjum vørum til menn og kvinnur.

Við nýggju røðini »Below Your Belt« fer Hans Fróði Hansen inn á ein marknað, har eingin veruliga hevur verið fyrr. Sum navnið eisini sipar til, er hetta ein vakurleikavøra til tað allarheilagasta.

Nokk við flosklum og uttanumtosi. Below Your Belt er eitt nossakrem, eitt krem til intimbarberingina. Hetta er ein nýggj røð av kremi, sum til teir menn, sum vilja brúka tað, lovar blankar kúlur.

- Below Your Belt er eitt heilt nýtt brand, og er tað fyrsta á marknaðinum, sum er beinleiðis til barberingina av tí staðnum, sum eingin tosar um, men sum næstan øll »hampa« um, sigur Hans Fróði Hansen.

Nýggja røðin er á ongan hátt, hóast hon er til tann erotiska partin, merkt av fúlheit. Pakningurin og merkið sær úteftir ógvuliga stílfult út.

### Stórt potentiali

Hans Fróði Hansen er greiður yvir, at hetta er ein vøra, sum flytir nøkur mørk, ikki bara í Føroyum, har lítið verður tosað um teir privatu partarnar, men eisini í øðrum londum. Tó heldur hann, at tað er eitt ótrúliga stórt potentiali í Below Your Belt.

- Ein dama í Los Angeles spurdi meg, um eg havi gjørt nakað research áðrenn eg komi við hesari vøruni. Men man kann jú bara staðfesta, at heimurin er ótrúliga stórur, og helvtin av fólkunum eru menn. Í øllum førum teimum londunum, har fólk brúka pengar upp á sjálvsrøkt, er tað ein ótrúliga stórur, ómettaður marknaður, sigur Hans Fróði Hansen.

### Fýra heimspartar upp á fáar vikur

Below Your Belt er nýtt fyri teimum flestu í Føroyum, men í Danmark og Skandinavia hevur røðin vakt stóran ans.

Danska Ekstra Bladet valdi herfyri BYB til ársins jólagávu, og vøran er longu komin út í fýra ymiskum heimspartum.

- Upp á heilt fáar vikur hava vit klárað at koma út á fýra kontinentum - Evropa, Norðuramerika, Asia og Afrika, greiðir Hans Fróði Hansen frá.

Hartil er Below Your Belt nú eisini millum uppskotini til heilar átta titlar í Danish Beauty Awards, sum verður hildið í apríl, og sum heiðrar vakurleikavørum í 25 ymiskum bólkum, millum annað sum ársins nýggja brand.

Sostatt gongur tað við rúkandi ferð við nýggju vakurleikarøðini.

- Og at vit eru í uppskoti til Danish Beauty Awards gevur eisini brandinum ein ótrúligan kreditt, sigur Hans Fróði.

### Eitt brand við stíli

Below Your Belt er eitt merki, sum vendir sær til tann stílfulla mannin, í sama stíli sum Gucci, Armani og Hugo Boss.

Eins og Playboy hevur eina kanin, hevur Below Your Belt eisini eina pingvin sum symbol til merkið.

- Pingvinin er ein sterkur karakterur. Pingvinin er líkasum í einum klædningi, hon er sum ein gentlemaður, hon er stílfull, hon er sosial, hon er vinarlig og vísur umsorgan, og tað er hesin maðurin, sum vit vilja, at merkið eisini umboðar, sigur Hans Fróði Hansen.

Ætlanin er eisini at pingvinin skal gerast ímyndin, sum kann nýtast til fleiri nýggj ting og til at útbyggja brandið við.

### Ikki til føroyska marknaðin

Hans Fróði Hansen er greiður yvir, at hetta ikki er ein vøra, sum kemur at kollvelta í Føroyum, og hann staðfestir eisini, at ambitiónirnar eru ótrúliga stórar til hetta merkið.

- Hetta er eitt nýtt brand, sum er til so at siga allan heimin. Tað er eingin loyna, at tann føroyski marknaðurin ongantíð kemur at vera grundarlagið undir einum brandi sum hesum, og tí er hetta heldur ikki til tann føroyska marknaðin. Hetta er til allan heimin, sigur Hans Fróði Hansen.

Føroyingar eru tó ikki við sviðusoð, tí Below Your Belt kann keypast á netinum, og sambært Hans Fróða hava fleiri fyrispurningar verið úr Føroyum.

### Eisini til kvinnur

Below Your Belt hevur higartil bert verið ein vøra til menn, tó at kvinnurnar eisini fáa ágóðan av tí. Men í dag kemur Below Your Belt – Woman á marknaðin, og sostatt verður nýggja vakurleikarøðin hjá Hans Fróða Hansen útbygt til eisini at fevna um hina helvtina av heimsmarknaðinum.

Sostatt ger Hans Fróði Hansen enn eitt stórt upplop, og er navnið Hans F. Hansen, sum hann kallar seg undir í altjóða høpi, veruliga við at sláa seg fast í móta- og vakurleikaheiminum.




Keypssamtøkan í Hoyvík



Slaktarin í Hoyvík sóknast eftir

**Fólki at pakka**

at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu

Vit eru deild í einum størri virki, sum er í støðugari menning. Vit sóknast eftir einum kvikum og álítandi fólki, sum er lætt at vera saman við, at pakka vørur í slaktaradeildini

**Arbeiðstíð:** 32 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag

Hevur hetta tín áhuga, hoyra vit fegin frá tær við skrivligari umsókn

**Løn:**
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Lars Hansen, tel 314149 el. 281990

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Lars Hansen